# Bro, bro, brille

## Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Tveir luttakarir avgera í loyndum sínámillum, hvør er "sól" og "máni", ella t.d. súrepli og appelsin.**

Hesir báðir stilla seg við lyftum ørmum og gera eina brúgv, sum hini kunna ganga innundir og gjøgnum. Allir hinir luttakarnir ganga undir "brúnna" í einari ketu. Ketan verður gjørd við, at halda niður á akslarnar á tí sum gongur frammanfyri, ella, um tað eru minni børn, við at halda í tí sum gongur frammanfyri.

Ketan gongur síðan gjøgnum/undir "brúnna", og gera eitt 8-tal, meðan øll syngja **Bro, bro, brille**.

Tá komið verður til orðið **"gryden"**, koyra "sólin og mánin" armarnar niður og fanga ein av luttakarunum í ketuni.

Tann, sum verður fangaður, verður síðani spurdur um hann velur sól ella mána. Tað er týdningarmikið, at hini ikki hoyra hvat hann velur, tí tað er eitt loyndarmál, hvør er "sólin" ella "mánin".

"Fangin" stillar seg síðan aftan fyri "sólina" ella "mánan", alt eftir hvat viðkomandi hevur valt.

Tá øll eru fangaði, og hava valt antin sól ella mána, kemur styrkiroyndin: Tey sum standa aftanfyri "sólina" gera eina ketu, við at halda um miðjuna á tí sum er frammanfyri. Á sama hátt verður gjørt við "mánan". "Sólin" og "mánin" hála so í hvønn annan, við hjálp frá "fangunum" at vita hvør síðan vinnur.

**Bro, bro, brille**

*Bro, bro, brille!*
*Klokken ringer el've,*
*kejseren står på sit høje hvide slot,*
*så hvidt som et kridt,*
*så sort som et kul.*

*Fare, fare, krigsmand,*
*døden skal du lide,*
*den, som kommer allersidst,*
*skal i den sorte gryde.*

*Første gang så la'r vi ham gå,*
*anden gang så lige så,*
*tredie gang så ta'r vi ham*
*og putter ham i gryden!*



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo